**Munnligur fyrispurningur**

**til Johan Dahl, landsstýrismann**

**um manglandi upplýsingar til Løgtingið um fíggjarstøðuna hjá SSL**

1. Hví hevur landsstýrismaðurin ikki biðið um eykajáttan frá Løgtinginum til Strandfaraskip Landsins (SSL), tá landsstýrismaðurin visti, at politisk undirtøka ikki var fyri teimum sparingum, ið vóru fyritreyt fyri játtanini til SSL í fíggjarlógini fyri 2013?
2. Hevur SSL fráboðað Vinnumálaráðnum, at neyðugt var við umfatandi sparingum fyri at halda játtanina í fíggjarlógunum fyri 2013 og 2014?
3. Nær visti landsstýrismaðurin av, at undirtøka ikki var fyri sparingunum, ið vóru fyritreyt fyri játtanini í fíggjarlógini fyri 2013?
4. Nær varð Vinnumálaráðið kunnað um, at játtanin til SSL í fíggjarlógini fyri 2013 ikki fór at halda?
5. Er tað rætt, at Vinnumálaráðið hevur givið starvsfólkum hjá SSL munnkurv viðvíkjandi avleiðingunum av tí játtan, ið var á fíggjarlógini, til eftir 3. viðgerð á Løgtingi av fíggjarlógini?
6. Hví hevur Vinnumálaráðið tikið týðandi part av upplýsingum frá SSL, um avleiðingar av játtanini í fíggjarlógini fyri 2014, burturúr tekstinum í fíggjarlógini fyri 2014?
7. Nær fer grannskoðanarfrágreiðing at fyriliggja um málið, og hvat fer henda at lýsa?

**Viðmerking**
Ósamsvar er millum frágreiðing frá fíggjarleiðara hjá Strandfaraskip Landsins og frágreiðingina frá landsstýrismanninum í vinnumálum í málinum um fíggjarligu støðuna hjá SSL, og kunning til Løgtingið í hesum sambandi.

Víst hevur verið á, at landsstýrismaðurin hevur afturhildið týðandi upplýsingum fyri Løgtinginum, í samband við viðgerð av fíggjarlógum landsins. Eisini verður víst á, at landsstýrismaðurin hevur lagt trýst á starvsfólk á stovninum um, ikki at kunna um avleiðingarnar av játtanini á fíggjarlógini, fyrr enn eftir at Løgtingið hevur samtykt hesa við 3. viðgerð.

Nú árið 2013 er farið framvið er nógv sum bendir á, at játtanin hjá SSL ikki røkkur. Orsøkin skal m.a. helst finnast í, at landsstýrismaðurin ikki hevur havt politiska undirtøku fyri teimum átøkum, ið vóru fyritreyt fyri játtanini í 2013. Hetta hevur landsstýrismaðurin vitað, og hóast hetta, so hevur landsstýrismaðurin ikki biðið um eykajáttan.

Fyribils er einasta avleiðingin, at stjórin á SSL er farin úr starvi. Landsstýrismaðurin og Vinnumálaráðið meta seg eftir øllum at døma ikki hava gjørt nakað skeivt í hesum máli. Men er tað so?

Fyri at fáa lýst málið, og leiklut landsstýrismansins í hesum, verða hesir spuringar settir.

Á Løgtingi, 28. januar 2014

**Kristina Háfoss**
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi